# Misti høvdið

**Ofta verður sagt, at tað sum skilur leikarar sum Michael Laudrup, Ronaldinho og Zinedine Zidane frá restini er, at teir eru klókir, og brúka høvdið. HM-finalan varð leikt í gjár, og alt sá gott út hjá Zidane, líka til hann brúkti høvdið, tá hann ikki skuldi brúka tað**

ZIDANEMÁLIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Franska landsliðið var avskrivað longu áðrenn HM-kappingin var byrjað. Seinasta EM-endaspæl var snøgt sagt ein fiasko hjá teimum, og alheimsins fjølmiðlar góvu ikki fyrrverandi fronsku heims- og evropameistarunum nakran sum helst møguleika tá HM-kappingin fór á rull.

Tað sá heldur ikki út av mongum, tá bólkaspælið var spælt. Gaman í, franska landsliðið hevði spælt seg víðari, men tað var ikki gjørt á serliga sannførandi hátt. Teir høvdu framvegis ongan kjans, spáddu stóru fótbóltsserfrøðingarnir. Stjørnurnar vóru mettar, útbrendar og leikarin, sum meiri enn nakar annar skuldi lyfta liðið, Zinedine Zidane, var heldur ikki á sama støði sum áður.

### Lyfti liðið

Men best sum, at franska liðið var spælt av vøllinum og heim av serfrøðingum og viðmerkjarum, so trein Zinedine Zidane fram og gjørdi tað, øll vita, at hann dugir. Hann var meiri enn nakar annar maðurin aftan fyri sigurin í fjórðingsfinaluni móti spaniumonnum, og var tað eisini ein fragd fyri eyga, tá hann staðfesti sigurin við seinasta málinum í dystinum.

Í fjølmiðlunum aftan á dystin stóðu somu journalistar og serfrøðingar, sum framman undan høvdu avskrivað liðið, nú og hálovaðu franska liðnum og Zidane. Hann var munurin á liðunum báðum, og við honum á odda kundi franska liðið bráddliga yvirraska.

Í hálvfinaluni møttu fransarnir portugisum. Frankaríki vann 1-0, og málið gjørdi, sjálvandi, Zinedine Zidane. Hann hevði jú funnið stórformin fram og vildi enda karrieruna á ein virðiligan hátt.

### Kundi avgjørt við høvdinum

Í sjálvari finaluni tóktiskt Zidane at vera sera vælupplagdur. Hann stýrdi liðnum frá miðvøllinum, og fleiri ferðir sóu vit dømi um hansara framúrskarandi bóltførleika og yvirlit. Hann vísti eisini seg sum ein rættur liðformaður eigur at gera, tá Marco Materazzi koyrdi Malouda um koll í brotsteiginum. Framman fyri sær hevði Zidane besta málverjan í kappingini, men ísakaldur og uttan stórvegis hóvasták, lobbaði hann bóltin upp undir tvørtræið og bólturin støkk í svørðin innanverts málstrikuna. Eitt brotsspark, sum bara ein meistari megnar skjóta so sannførandi.

Italiumenn javnaðu, tá Materazzi stútaði eitt hornaspark í netið, og 1-1 støðan helt sær til vanliga leiktíðin var av. Í umdystinum vóru fraklendingar um at skora, tá Zidane royndi seg við høvdinum, men Buffon bjargaði meistarliga góðu royndini.

Løtu seinni var Zidane aftur í andglettinum. Hann og verjuleikarin Materazzi kjakaðust sína millum, men tað sá ikki út at tí stóra. Zidane rennir eisini frá Materazzi, og at síggja til er stríðið teirra millum liðugt. Men við eitt støðgar Zidane á, hann kúvendir og við nógvari ferð skallar hann italska verjuleikaran í bringuna.

Marco Materazzi eymkar seg, men dómarin sær ikki tilburðin, og Zidane verður heldur ikki revsaður í fyrstu atløgu. Italiumenn eru í øðini og málverjin Buffon ger linjuverjan vart við, at her mátti verið okkurt hann hevði sæð. Tað hevur hann ikki, og vísir hann Buffon frá sær.

Men so er tað, at dómarin fer út til linjuverjan. Teir tingast ikki longi, og tá dómarin kemur inn aftur hálar hann reyða kortið úr lummanum og vísir Zinedine Zidane av vøllinum.

### Video ella ikki

Tað ber ikki til at seta spurnartekin við, um útvísingin var røtt ella ikki. Maðurin skallar ein annan leikara, og tað hevur akkurát onki við fótbólt at gera. Men spurningurin, sum beinanvegin reisti var, á hvørjum grundarlagi dómarin gav fraklendinginum reyða korti.

Dómarin sá onki, ei heldur linjuverjin. Tað gjørdi fjórði dómarin, og tað var hann, sum kunnaði høvuðsdómaran um tilburðin umvegis nýggja samskiftisskipanina við oyrasniglum. FIFA hevur boðað frá, at fjórði dómarin sá tilburðin í tí løtu hann fór fram, men bæði italski og franski landsliðsvenjarin halda uppá, at hann hugdi eftir videoupptøkum og síðani tók støðu.

Er tað satt, so er hetta eindømi í fótbóltssøguni. Ongantíð áður hava videoupptøkur verið nýttar undir einum dysti, men kjakið um hvørt tað er rætt ella ikki, hevur staðið á í langa tíð. Í Føroyum er enn ikki greiða fingin á, um vit eiga at nýta videoupptøkur í landskappingini, men ein av bestu dómarum, vit eiga, Petur Reinert, hevur greiðar meiningar um videoupptøkur og fótbólt, sum tit kunnu lesa aðrastaðni á síðunum.

Ein annar spurningur sum eisini verður reistur, aftan á tilburðir sum hesar, har ein av heimsins bestu fótbóltsleikarum nakrantíð fullkomiliga missir høvdið, er, hvussu ber tað til? Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, vil ikki stilla eina diagnosu upp á Zidane, men í lítlari samrøðu við hann aðrastaðni á síðunum, kunnu tit lesa hansara meting av tí sum hendi, har hann millum annað staðfestir, at Zidane er ikki meiri enn eitt menniskja sum øll onnur.

### Háðaði familjuna og klípti í bringuna

Tá upptøkurnar vórðu vístar umaftur í sjónvarpinum sást, at Materazzi segði okkurt við Zidane, tá hann gekk frá honum. Útlendsku fjølmiðlarnir vilja vera við, at Materazzi háðaði mammu Zidane, sum er deyð. Aðrir miðlar siga, at Materazzi klípti Zidane í vørtuna, og at tí hann tí leyp fram av.

Hvussu er og ikki, so er tað framvegis ein gáta, hví hann gjørdi sum hann gjørdi. Wayne Rooney varð útvístur í dystinum móti Portugal, og hann hongdur út sum stóri syndabukkurin í ensku fjølmiðlunum. Men Zinedine Zidane er størri enn so, og flest øll bera yvir við honum. Liðfelagar, landsliðsvenjarin og franski forsetin stuðla allir Zidane, hóast teir allir viðurkenna, at hevði uppiborið reyða kortið.

Tað staðfestir av sonnum, at hóast besti leikarin undir HM misti høvdið, so fer hann í søguna fyri síni framúr evni sum leikari, og ikki sum búrhundurin, sum fekk 12 reyð kort í síni karrieru.

# Franski kongurin fall

**Øll vórðu ovfarin, tá Zidane misti tamarhaldið á sær sjálvum og brúkti harðskap í HM-finaluni. Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, heldur hendingina vera syrgiliga fyri fótbóltin, men metir, at hetta kundi hent fyri tey flestu av okkum**

FÓTBÓLTUR
*Theodor E. D. Olsen*

Undan HM-finaluni í fótbólti sunnukvøldið sendi Sjónvarpið eitt innslag, har fólk á gøtuni søgdu, hvørji tey vónaðu fór at vinna. Nógv svaraðu, at tey vónaðu, at tað fór at verða Frakland, tí tey hildu, at tað hevði Zinedane Zidane uppiborið. Hesin franski fótbóltsúrmælingurin, sum hevur skarað framúr í á heimsins fótbóltsvøllum, og sum hevði boðað frá, at hetta fór at vera hansara síðsti dystur, tí hann vildi gevast á tindinum. Ein franskur sigur lá á hansara herðum, og tann franska republikkin átti eina hetju og ein høvdinga í hesum gávaða einstaklingi.

Hann byrjaði finaluna væl við skjóta eitt brotsspark sera yndisliga í meskarnar, og í umdystinum var um reppið, at hann endaði í søgubókunum við einum bólti, sum hann hegnisliga mundi sent í málið við høvdinum.

Ístaðin misti Zidane tamarhaldið á sær sjálvum og í sinnismuni rendi hann høvdið í bringuna á italska verjuspælaranum Materazzi, sum small í tann grøna svørðin. Tað var ikki greitt beinanvegin, hvat var hent, men tá viðmerkjararnir á teimum ymsu fótbóltsrásunum sóu, at tað var Zidane, sum hevði framt hesa illgerðina, vóru teir púra paff og trúðu tí valla. Onkur royndi at verja hann.

Italiumenninir tóktust eisini at vera harmir um, at tað var Zidane, ið skuldi enda sina yrkisleið á henda hátt. Hevði tað verið onkur annar franskmaður, sum hevði framt illgerðina, kundi ein ímyndað sær, at italiumenn høvdu lopið á hann.

### Illsinnisgleps

Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, sá sum so nógv onnur finaluna, og eisini hann væntar, at tey flestu mundu vera púra ovfarin av hendingini, og hann heldur, at finalan gjørdist til ein óneyðugan sorgarleik. Zidane var nevniliga tann eyðsýnda hetjan, sum hevur ført Frakland til finaluna, og franski sigurin var heldur ikki langt burtur, metir Eyðun Joensen og sipar serliga til ta ferðina Zidane í umdystinum næstan fekk skallað bóltin í málið.

– Men tað er áhugavert, at tað skal so lítið til at koppa øllum, sigur Eyðun Joensen. Hann leggur dent á, at hann ikki kann seta nakra sálarfrøðiliga diagnosu á sinnismunin hjá Zidane, men at hetta er tað, tey á fakmálinum kalla eina affektreaktión. Á vanligum gerandismáli kann hetta helst umsetast til øði ella illsinnisgleps, sum kann koma fyri, tá sinnið heldur enn vit og skil tekur ræði á einum menniskja.

Eyðun Joensen heldur tó, at vit øll kundi komið út fyri at gjørt okkurt tílíkt, og at tey flestu hava roynt at smekkað eina hurð í ella okkurt tílíkt, tí sinnið kann spæla okkum eitt puss og at tað er alment menniskjasligt at gera slíkt, metir sálarfrøðingurin, sum sigur seg hava hug at fyrigeva Zidane, hóast tað kann vera torført at fyrigeva.

- Í longdini kann tað eisini gerast harmiligt fyri italiumannin, tí hann man eisini hava ringan smakk í munninum, heldur Eyðun Joensen, ið heldur tað vera týðiligt, at hann klípti Zidane bringuvørtuna og allarhelst eisini segði okkurt keðiligt Zidane.

- Sum psykologur síggi eg eisini eina mynd aðra mynd, nevnilga eina mynd av fótbóltshetjuni, sum ikki bara er ein kaldur og kyniskur spælari, sigur Eyðun Joensen, ið sipar til leiklutin hjá Zidane sum kendur miðavallarstrategur, men sum vit nú kanska fáa eina meira fjølbroytta mynd av.

Eyðun Joensen heldur, at hendingin er sera keðilig fyri fótbóltin, og at sjálvt "hann", tvs. sjálvur Zidane, sum hevur verið tann eyðsýnda hetjan, kunnu gera slíkt, men at ikki nýtist at kollvelta myndina av honum, tí so verða vit nógv, sum skulu roknast við í eina slíka mynd, tí slíkt kann vera nokkso menniskjasligt, heldur hann.

### Forsetin virðing fyri Zidane

Hvørjar orsøkirnar vóru til, at Zidane leyp fram av, eru tað nógv sum gita um. Sjálvur vildi Materazzi ongar viðmerkingar gera eftir dystin, og Zidane læt ikki við seg koma. Hann valdi heldur at fjala seg, enn at koma og taka ímóti silvurheiðursmerkinum.

Sum nevnt sigur Eyðun Joensen seg sum vera man ikki kunna geva nakra endaliga diagnosu, men vísir á, at strongd kann vera orsøkin til at Zidane leyp framav, og at strongd í fleiri førum fær fólk at gera mistøk.

Okkurt kundi bent á, Eyðun Joensen hevur rætt í, at eftirmælið hjá Zidane ikki er so illa farið, sum væntast kundi, tí í dag varð kunngjørt, at í eini atkvøðugreiðslu millum tíðindafólk er Zidane kosin at vera besti spælarin í HM-kappingini í ár, og tí vinnur hann sokallaða "Gylta bóltin".

Liðfelagarnir hjá honum siga seg eisini stuðla honum, og ikki minst hevur franski forsetin, Jacques Chirac, sagt eftir dystin, at hann hevur stóra virðing fyri Zinedine Zidane.

Enn er sum sagt ikki greitt, hvat hendi millum Zidane og Materazzi, áðrenn Zidane við stútaði italiumannin í bringuna. Onkur vil vera við, at Materazzi segði okkurt ljótt um mammu Zidane, sum er deyð. Onnur vilja vera við, at Zidane varð kallaður yvirgangsmaður, av tí at hann er muslimur og er ættaður í Algeria.

Men í øllum førum er greitt, at bæði fótbóltsáhugað og onnur eru bilsin av, at tann franski fótbóltsgudurin, hetjan Zidane, kundi leypa framav og lata sinnið vinna á viti og skili. At úrmælingurin kundi falla, tá hann skuldi enda á tindinum. At tað kundi henda.

Men kanska sigur tað líka nógv um okkum sum um Zidane.